

## Hækka skatt og gera íløgur

Á fundi í fíggjarnevndini í Klaksvíkar býráð varð sambært Norðlýsinum í gjár gjørd semja um, at raksturin hjá Klaksvíkar Kommunu fer at minka við 25 mió. krónum komandi ár. Tað tykist greitt, at neyðugt verður at hækka skattin við einum prosenti, samstundis sum raksturin hjá kommununi verður minkaður niður um 90 mió. krónur. Seinastu framrokningarnar siga, at inntøkurnar hjá kommununi komandi ár verða 125 mió. krónur, og við skattahækkingini koma inntøkurnar upp á 131 mió. krónur. Tískil verður pláss fyri íløgum, og her verður tað mesta lagt í nýbyggingina av Ósáskúlanum, skrivar Norðlýsið. Sum skilst fer niðurskurðurin í rakstrinum millum annað at merkja uppsagnir, men eingin vil siga, hvussu nógvar talan verður um. Ógreitt er eisini, hvussu breið semjan er um at fremja sparingarnar. Men sum skilst er tað ein meiriluti í býráðnum, sum stendur aftan fyri semjuna.

# Nýggj tónleikakapping



*FM08 er heitið á nýggju tónleikakappingini, ið Guðrið Hansdóttir og Margarinfabrikkin skipa fyri. Freistin at melda til er 15. november, og fyrsta umfar verður 22. november*

**Síðan Prix Føroyar kappingin varð niðurløgd, hevur tørvur verið á einum palli hjá nýggjum bólkum at spæla á. Nú verður farið undir eitt mini-prix, nevnliga FM08, har allar sjangrur kunnu luttaka**

TÓNLEIKUR
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Saman við Margarinfabrikkini skipar Guðrið Hansdóttir nú fyri einari nýggjari tónleikakapping, ið hon nevnir FM08.

Navnið kann merkja bæði føroyameistarakapping í tónleiki ella Faroese Music, men innihaldið í kappingini er greitt.

- Síðan Prix Føroyar kappingin varð niðurløgd, hevur tørvur verið á einum palli hjá nýggjum bólkum at spæla á, og har nýggir bólkar kunnu koma fram. Tað varð vanliga sagt, at tá Prix Føroyar fór niður, komu festivalarnir upp, men nýggir bólkar fáa ikki møguleikan at spæla á festivalunum. Eisini hava vit eina kapping sum GBOB, men tað er ein meira altjóða kapping, har tað meira eru rokkbólkar og bólkar, ið spæla harðan rokk, ið sleppa framat, sigur Guðrið Hansdóttir, ið er fyriskipari av nýggju tónleikakappingini.

Sambært henni eru fleiri sjangrur, ið ongan pall hava at spæla á í løtuni, harímillum popp, og einki er hjá bólkunum at venja fram móti, og tí verður farið undir hesa nýggju kappingina, har allar sjangrur eru vælkomnar.

- Øll kunnu luttaka í FM08, einstaklingar og bólkar í øllum sjangrum. Tó er tað ein treyt, at bólkurin ella einstaklingurin ikki hevur givið fløgu út áður, greiður Guðrið Hansdóttir frá.

### Leggja dent á originalitet

Umframt at bólkurin ella einstaklingurin ikki skal hava givið fløgu út áður, eru sjálvandi eisini aðrar treytir, ið skulu uppfyllast.

- Hvør bólkur ella einstaklingur fær 15 minuttir á pallinum, og ein onnur treyt er, at tey framføra tvey egin løg innan hesar 15 minuttirnar. Hetta gera vit fyri at leggja dent á, at tað er originalt og egið, ið tey framføra, sigur Guðrið Hansdóttir.

Guðrið Hansdóttir ivast ikki í at nógv nýggj og góð løg verða at hoyra.

- Higartil hevur undirtøkan verið góð, og fleiri eru longu tilmeldaði. Eg veit um fleiri bólkar úr Margarinfabrikkini, ið verða við í kappingini, og sum venja fram móti hesum, sigur Guðrið Hansdóttir.

### Vinna studiotíð

Kappingin FM08 verður øll hildin í Reinsaríinum í Tórsgøtu, og fyrsta innleiðandi umfarð verður hildið 22. november, næsta innleiðandi umfarð verður hildið 29. november og finalan verður so tann 6. desember.

Tað verða tríggir dómarar, ið fara at gera av, hvør verður vinnari av kappingini, og teir eru eingir minni enn Terji Rasmussen, Lena Andersen og Niels Arge Galán.

Høvuðsvinningurin í kappingini verður fimm dagar í Studio Oyravox, har møguleiki verður fyri at taka nøkur løg upp, ið teir kunnu brúka til demo og at leggja út á internetið.

### Skapa lív í býnum

Øll kappingin verður, sum sagt, hildin í Reinsaríinum í Tórsgøtu, og endamálið við at hon verður júst har, er at skapa lív í býnum aftur, og fyri at vera í nærumhvørvinum. Reinsaríið hevur júst fingið nýggja tónleikaútgerð, og tískil skuldu karmarnir verið sera góðir fyri nýggju tónleikakappingini, FM08.

- Harafturat er hetta ein lágprískapping, har vit ikki hava nakrar sponsorar við í leikinum. Hetta er bara eitt egið tiltak, har vit vilja leggja dent á tónleikin, heldur enn pengarnar, sigur Gurðið Hansdóttir at enda.